# Ancelotti er ikki bangin



Hóast venjarin hjá Manchester United vil leypa á, so er Milan-venjarin, Carlo Ancelotti púra róligur undan dystinum í kvøld. - Skora teir, so er tað eingin vanlukka. Dysturin er altso 90 minuttir, og eg eri vísur í, at vit kunnu skora fleiri ferðir. Okkara mál er at hava tamarhald á dystinum. Tað høvdu vit í 60 minutti á Old Trafford, og hesa ferð mugu vit bara halda fast allan vegin, sigur Ancelotti.

# MB fær vitjan frá Tranbjerg

Hósdagin 3. mai til mánadagin 7. mai kemur eitt dreingjalið frá AIA Tranbjerg, sum telur 15 leikarar og 4 leiðarar til Føroya at vitjan hjá Miðvágs Bóltfelag.

Ferðin er komin í lag gjøgnum Kára á Prestrøðni, formann í MB og samstarv í kappingini " Football Festival" í Aarhus, har MB vanliga luttekur við einum dreingjaliði. Ein kapping, sum verður í juli mánað í ár. MB hevur luttikið síðani 2004 í "Football Festival", sum er ein stór altjóða fótbóltsstevna við umleið 130 feløgum.

Umframt útferðir í Havn, Eysturoynni og í Vágunum, spælur liðið 3 dystir á ferðini. Hesir verða móti NSÍ, B36 og einum samansettum liði hjá SÍ og MB.

B71-Skála:

# Trívast best á útivølli

**Felags fyri Skála og B71, sum í kvøld hittast fyri fyrstu ferð nakrantíð í bestu deildini, er, at tey higartil bara hava vunnið á útivølli**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í kvøld verður søga skrivað á Skála. Tá fara Skála og B71 fyri fyrstu ferð nakrantíð at spæla ímóti hvørjum øðrum í bestu deildini. Hægsta støðið, sum uppgerð higartil hevur verið ímillum hesi feløgini, var á heysti í 2001, tá ið tey í endaspæli telvaðust um pláss í bestu deildini.

B71 endaði tað árið næstniðast í bestu deildini, og Skála endaði næstovast í næstbestu deildini. Í endaspælinum vann Skála og flutti upp, meðan B71 flutti niður. Á Sandi var úrslitið 4-1 til Skála, og á Skála vann B71 1-0.

Higartil í ár hevur tað hjá báðum feløgunum hilnast betri á útivølli enn á heimavølli. Skála hevur tvær tær seinastu ferðirnar fingið fult ávikavíst í Gøtu og í Vági. B71 hevur vunnið í Gundadali ímóti HB og á Argjum.

Sunnudagin megnaði B71 fyrsta stigið á heimavølli ímóti GÍ. Skála vann næstsíðsta sunnudag trilvaligan 3-0 sigur í Sarpugerði.

Síðsta sunnudag vóru Anders Rasmussen og Eli Hentze ikki tøkir hjá B71. Í gjárkvøldið var ikki greitt, um hesir báðir lyklaspælararnir verða førir fyri at spæla í kvøld.

Einasti skaddi Skála spælarin er Tony Rasmussen, sum eftir langan steðg er um at koma fyri seg aftur. Skála málverjin, Predrag Markovic, er orsaka av sjúku farin ein túr heim til Serbia. Tað sigst, at hann verður skjótur aftur.

Higartil hevur tað ikki bilað, at málverjin er burturstaddur. 16 ára gamli Hans Jørgensen hevur fingið møguleikan millum stólparnar, og tað kann ikki sigast annað, enn at hann hevur tikið av. Í tveimum dystum er einki mál farið ígjøgnum hjá honum.

Í Vági var ikki pláss millum teir fyrstu ellivu fyri liðformanninum Paula G. Hansen og Boga Gregersen. Lítil ivi man vera um, at í hvussu so er Pauli verður á vøllinum, tá ið fyrsta bríkslið hjá Lars Müller verður á Skála klokkan 18 í kvøld.

GÍ-B36:

# Liðfomaðurin leikbannaður

**Kenneth Jacobsen er leikbannaður í kvøld, Allan Mørkøre er skaddur og Klæment Matras hevur stórar trupulleikar við fótliðinum. Tað er status hjá B36, sum vitjar í Sarpugerði, har GÍ bert vantar Símun Luis Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Heimaliðið GÍ hevur higartil í ár vunnið tveir dystir, tapt tveir og spælt tveir javnar. Teir hava átta stig, skotið níggju mál og latið 12 ígjøgnum. Hjá B36 sær tað eitt sindur øðrvísi út. Teir hava vunnið fýra dystir, tapt ein og spælt ein javnan. Teir hava skotið 11 mál og eru tað liðið, ið hevur latið næst fæst mál ígjøgnum í Formuladeildini í ár – fimm mál.

Tá dysturin í kvøld er spældur, vera omanfyri nevndu tøl ikki heilt tey somu. Spurningurin er bara hvønn veg tølini fara at tala.

GÍ hevur verið nakað plágað av skaðum í ár. Símun Louis Jacobsen er langtíðarskaddur og verður uttanfyri nakrar vikur aftrat. Hans Jørgen Djurhuus hevur eisini verið nógv plágaður av skaða, men síðsta dyst ímóti B71 og sær út til at vera komin fyri seg.

Kappingarársbyrjanin hjá GÍ hevur ikki verið nakað at rópa hurrá fyri, men ei heldur nakað ovurstórt vónbrot. Skuffandi er tað tó, at liðið ikki hevur vunnið á heimavølli í nærum eitt heilt ár. Hesa keðiligu gongd ætla teir at bróta í kvøld vælvitandi um, at B36 ikki er so at syfta.

Havnarmenninir, sum koma norður, eru nakað skerdir. Kenneth Jacobsen fekk tvey gul kort frá Rúna Gaardbo farna leygardag, og er tí leikbannaður. Tað var í dystinum móti AB, og í hesum sama dysti varð Klæmint Matras borin av vøllinum við skaða, tá fótliðurin í øðrum beini hansara ikki vildi meir. Sum skilst er tað serstakliga ivasamt, um Klæmint fer at spæla í kvøld. Tað er tó eingin ivi um, at Allan Mørkøre ikki verður á vøllinum í kvøld. Hann er enn ikki komin fyri seg, eftir harða umgangin frá Marcin Dawid í HB-dystinum.

Men hvussu er og ikki, so verður spennandi at fylgja dystinum í kvøld, um B36 megnar annaðhvørt at økja um fjarstøðuna niður til NSÍ ella at hála inn á EB/Streym á 1. plássi.



*Klæmint bleiv skaddur og Kenneth sá reytt í dystinum móti AB farna sunnudag*

*Mynd: Alfie*

EB/Streymur – NSÍ:

# Anderson við í Streymnesi



*NSÍ hevur toppskjúttan við aftur á liðnum, tá teir í kvøld skulu royna at fanga oddaliðið aftur*

**Brasiliumaðurin hjá NSÍ, Anderson Castilho, verður við aftur, nú runavíkingar vitja hjá EB/Streymi, sum hevur Rafal Kwiecinski tøkan aftur til toppdystin í Streymnesi**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá NSÍ var í Gundadali farna sunnudag, fór teir av vøllinum uttan mál. Og maðurin, sum hevur skotið sjey av teimum tólv málunum hjá NSÍ higartil, var ongantíð á vøllinum. Anderson Castilho var skaddur, men hevur meldað seg tøkan til toppdystin móti EB/Streymi í Streymnesi í kvøld. Tað er ein góður trumfur at fáa í hondina, hjá venjaranum Johan Nielsen.

Annars eru allir teir somu tøkir sum móti HB, so venjarin sleppur at velja og vraka sum honum lystir millum teir leikarar, hann ynskir at hava við til Streymnes.

Tað sleppur Piotr Krakowski, venjari hjá EB/Streymi, fyri so vítt eisini. Knút Vesturtún fær nokk ikki fær spælt í kvøld. Hann spældi við næstbesta liðnum hjá EB/Streymi um vikuskiftið, skoraði eitt mál, men bleiv skaddur.

Annars eru allir mans tøkir. Eisini Rafal Kwiecinski, sum seinastu mongu dystirnar hevur verið skaddur. Kviki póllendingurin hevur vant við fullari ferð í vikuni, og tí verður roknað við, at hann verður við í hópinum í kvøld.

Við hesum er lagt upp til ein javnan og spennandi á nýggja heimavøllinum hjá sundalagsfólki, tá tvey av teimum mest skorandi liðini í landskappingini hittast.